## Milliónarán í Glostrup

Eitt rán um vikuskiftið móti pengahúsinum Loomis í Glostrup kann vísa seg at vera hitt største í Danmark nakrantíð. Løgreglan upplýsti tíðliga, at talan var um 30 milliónir krónur, men nú verður sagt, at hetta er ein minsta upphædd. Størsta ránið higartil snúði seg um 41 milliónir krónur, og nú skrivar Politiken, at ránið í Glostrup kann snúgva seg um enn fleiri pengar. Loomis verður annars roknað sum eitt hitt tryggasta pengahúsið í Danmark, og løgreglan heldur tí, at talan kann vera um »innsider« vitan.



## Gøtan opin aftur

Ledra Street í kypriska høvuðsstaðnum Nicosia hevur staðið sum ímynd av stríðnum millum grikkar og turkar á oynni síðani turkisku innrásina í 1974. Men í morginárini verður aftur møguligt at spáka sær allan vegin gjøgnum gøtuna. Síðani vápnahvíldin varð fingin í lag hevur gøtan verið sperrað av einum múri. Grikkar hava síðani kunnað ferðast 800 metrar eftir gøtuni, meðan turkarnir ráða yvir 150 metrum av Lokmaci, sum teir hava valt at kalla gøtuna.

# Verður klárt í heyst

**Upprunaætlanin segði, at spakin skuldi setast í mánaðarskiftið februar/mars, men nú verður miðað eftir at byrja Stórutjørn verkætlanina í heyst**

STÓRATJØRN

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur tikið munandi longdi tíð at avgreiða øll loyvir hjá myndugleikunum, enn roknað varð við upprunaliga.

- Í løtuni sær út til, at tað gongur eftir tíðarætlanini, sigur Bárður Nielsen, stjóri fyri verkætlanini.

Men tað er kortini ikki uppruna tíðarætlanin, ið stjórin sipar til. Hon er langt síðani slept.

- At byrja við roknaðu vit við, at klárt fór at verða at seta spakan í í februar ella mars í ár. Hetta var kortini ikki nøkur almenn ætlan, men tað var tosið innanhýsis, og tað frættist skjótt millum fólk, sigur Bárður Nielsen.

Viðgerðin av málinum hevur kortini víst seg at verða so drúgv, at neyðugt var at sleppa uppruna tíðarætlanini.

- Málið skal fyri einar sjey ymiskar almennar stovnar, og tað hevur bara víst seg, at tað tekur drúgva tíð at fáa avgreitt málið, sigur Bárður Nielsen.

### Skunda undir

Stjórin fyri verkætlanini Stóratjørn sigur, at teir hava roynt at gjørt sítt til, at avgreiðslan av málinum skal ganga so skjótt sum tilber.

- Vit hava latið øll skjøl og tilfar annars inn beinanvegin, vit eru bidnir um hetta. So drálað hevur ikki verið frá okkara síðu. Men tað vísir seg bara at taka sína tíð at avgreiða málini á ymsu stovnunum, og tað mugu vit bara hava tol at bíða eftir, sigur Bárður Nielsen.

Hann vísir á, at neyðugt verður eisini við einari serligari byggisamtykt fyri økið við Stórutjørn, og at tað er skilligt, at slík mál taka tíð.

Teir arbeiða tí eftir einari nýggjari tíðarætlan, har miðað verður ímóti at byrja í heyst. Og tann tíðarætlanin sær í løtuni út til at halda.

- Gongur, sum tað sær út í løtuni, verður spakin settur í í heyst, og tað er tað, vit miðað eftir nú, sigur Bárður Nielsen.



*Gongur sum ætlað, verður verkætlanin Stóratjørn byrjað í heyst, sigur Bárður Nielsen, stjóri*

# Føroyskt ment alarmskipan á Sornfelli

**Tað er fyritøkan Globi SP/F, ið hevur ment skipanina, sum í hesum døgum verður sýnd fram á stórari KT-messu í Oslo**

ALARMSKIPAN

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Regin W. Dalsgaard er í løtuni á KT-messu í Oslo, har hann ætlar sær at sleppa inn á norska marknaðin við nýggju alarmskipanini*

Tað er Regin W. Dalsgaard, sum hevur ment hesa alarmskipanina, sum virkar umvegis sms-skipanina.

Skipanin er í høvuðsheitinum ein alarm/kunningarskipan, ið sendir sms-boð til starvsfólk, um nakað er áfatt. Skipanin er í brúk hjá Færøernes Kommando í sambandi við skipanina á Sornfelli.

Í hesum døgum er Regin W. Dalsgaard í norska høvuðsstaðnum Oslo, har ein KT-messa er. Tað eru mong ár síðani, at ein KT-messa seinast var í Noregi, og tí vænta fyriskipararnir nógv fólk. Talan er um eina Business2Business messu, og tað merkir, at bert fyritøkur kunnu vitja á messuni.

Regin W. Dalsgaard fer at bjóða GlobiSMS-skipanina fram á hesi messu.

Færøernes Kommando sigur í sølutilfari hjá Globi:

»Globialarm skipanin merkir í stuttum, at okkum ikki nýtist at vera á staðnum. Í okkara skipan er neyðugt at vita, um trýstið er optimalt, um køliskipanin virkar, um streymur er á osfr. Við Globialarm er øll hendan vitan tøk – í okkara lummum og á okkara fartelefonum. Og av tí at skipanin er web-grundað, kunnu vit vera hvar tað skal vera í heiminum og svara alarminum«

Globi ætlar nú at koma inn á norska marknaðin við skipanini.